ítróttur

Nr. 85 • leygardagur • 7. mai 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Bygdirnar eiga finaluna

**Óvæntaðu úrslitini í fjórðingsfinaluni bera við sær, at høvuðsstaðurin fyri fyrstu ferð, síðani steypafinalan gjørdist partur av Ólavsøkuni, ikki verður umboðaður í steypafinaluni**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*



*Higartil hava havnarfeløgini altíð átt umboð, tá steypafinala hevur verið á Tórsvølli, men soleiðis verður ikki í ár*

Bólturin er rundur, einki er avgjørt, fyrrenn alt er avgjørt og allar hinar frasurnar, sum verða nýttar í fótbólti, hava enn eina ferð staðið sína roynd. Tá ið lutturin varð kastaður í steypakappingini fyrr í vár, varð beinanvegin fokuserað á, at nú var møguleiki fyri, at B36 og HB fyri fyrstu ferð, síðani steypafinalan gjørdist partur av Ólavsøkuni, kundu hittast í steypafinaluni.

B36 og HB eru á ovastu plássunum í landskappingini. Men eftir at fjórðingsfinalurnar vórðu avgreiddar Kristi Himmalferðardag, er tað púra greitt, at høvuðsstaðurin fer ikki at verða umboðaður í steypafinaluni. B36 reyk út orsaka av umsitingarligum kleyvarskapi, og hósdagin tapti HB á heimavølli fyri ÍF.

2. deildarliðið hjá B71 vann á TB, botnliðið í 1. deild, GÍ, vann á heimavølli á Skála, sum teir sunnudagin á sama vølli taptu fyri í landskappingini, og B68 í 2. deild vann á Fram í 3. deild.

Øll úrslitini vóru meiri ella minni óvæntað, og ikki minst á Toftum, har sigurin hjá B68 var so tepur, sum hann kundi vera, var úrslitið óvæntað. Úrslitini bera við sær, at Eysturoy fer at eiga annað liðið í finaluni, og at stríðið um hitt plássið fer at verða millum felag í Eysturoy og B71.

Í hálvfinaluni 6. juli og 24. juli verður spælt soleiðis: ÍF-B68 og B71-GÍ. ÍF og B71 eiga heimavøll 6. juli,og B68 og GÍ eiga heimavøll 24. juli.

Fyrsta finalan á Ólavsøku var í 2001, tá ið B36 vann á KÍ. Í 2002 vann NSÍ á HB, í 2003 vann B36 á GÍ, og í fjør vann HB á NSÍ. Fyrsta finalan á Tórsvølli var í 2000. Hon var ikki á Ólavsøku, og tá vann GÍ á HB.

GÍ er einasti hálvfinaluluttakarin, sum eigur lut í steypinum, sum tað hevur verið spælt um síðani í 1999. KÍ vann í 1999, GÍ í 2000, B36 í 2001, NSÍ í 2002, B36 í 2003, og í 2004 vann HB.

# Brøndby fyri fimtu ferð

**Fleiri enn 34 túsund vóru vitni til fína steypafinalu, sum undirstrikar, at danskur fótbóltur hevur væl betri tak á, enn hann hevði bara fyri fáum árum síðani**

DANSKA STEYPAFINALAN
*Jóannes Hansen*

Kristi Himmalferðardag er steypafinala á skránni í donskum fótbólti. Soleiðis hevur tað verið í hálvt hundrað ár, og soleiðis var tað eisini í fyrradagin.

Hesa ferð vóru FC Midtjylland og Brøndby í finaluni. Tað varð vónað, at 30 túsund fóru at møta upp, og tað møttu fleiri enn 34 tusund í góðveðrinum. Lagið á teimum var gott, og tey bæði toppliðini syrgdu fyri intensari uppgerð, góðum spæli og fimm málum. Brøndby vann 3-2 eftir longda leiktíð, og harvið vunnu teir bláu og gulu steypakappingina fyri fimtu ferð, síðani teir fyrst í áttati árunum við stórari ferð struku inn á danska fótbóltspallin.

Brøndby var á odda 1-0 í hálvleikinum. Fyrrapartin av 2. hálvleiki skoraði FCM tvey mál, og so tóktist tað sum um, at tað skuldi ganga, sum tað so ofta hevur gjørt hjá Brøndby higartil í vár. Men so varð ein av FCM spælarunum, Pimpong, rikin av vøllinum, tí hann fekk seinna gula kortið, og síðsta løtan gjørdist støðugt trýst á FCM málið.

Brøndby javnaði til 2-2, og tíðliga í seinna umfarinum í longdu leiktíðini skoraðu teir sigursmálið. Tá var eingin orska eftir hjá FCM. Báðir partar vóru samdir um, at útvísingin var avgerandi, og FCM venjarin, Erik Rasmussen, var ikki blíður, tí hann helt seinna gula kortið og harvið útvísingina vera burturvið.

## Rógvi er íslendskur steypavinnari

Kristi himmalferðardag var finaludystur í lítlu íslendsku steypakappingini – sonevnda deildarbikarið.

Finalan stóð millum KR og Þróttur, og Rógvi Jacobsen var frá byrjan partur av miðverjuni hjá KR. Og hóast óvanda plássið, so stóð føroyski landsliðsmaðurin seg væl, og spældi hann allar 90 minuttirnar á tamb.

Leingi var líkt til, at Þróttur skuldi vinna. KR var annars á odda 1-0 í steðginum, men við tveimum tøttum málum koppaði dysturin. Tað eydnaðist tó Rógva og teimum at koma aftur í aftur, og eitt korter fyri leiklok javnaði Skúli Jón Friðgeirsson. KR hevði nú greitt yvirtak, og sum skilst, so var tað eisini uppiborið, at teir fingu sigursmálið fimm minuttir fyri leiklok. Hetta málið skeyt Sigmundur Kristjansson, og so kundu Róvi og liðfelagarnir fegnast um fyrsta steypið á árinum.

Deildar-bikarið er fyrra steypakappingin í Íslandi, og verður hon í nógvar mátar nýtt sum eitt slag av upphiting til landskappingina. Um hetta so eisini merkir, at føroyska landsliðsáleyparin nú skal venja seg við leiklut í miðverjuni, verður tó einki sagt um enn.

**-jm**